# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Undir Kletti í Havn:

## Kann nakar hjálpa við upplýsingum?

Er tað nakar, ið kann geva upplýsingar um eftirkomarar hjá Maren Frederikku Hansen (Hansdatter) úr Koltri og Hans Paula Joensen, undir Kletti, í Havn?

Eitt av børnum teirra var kendi handilsmaðurin í Havn, Hans Joensen, undir Kletti

Hesir upplýsingar eru tøkir:

Í 1901 er Hans Joensen einsamallur í húsi, og tá býr hann ikki undir Kletti.

Í 1911 er hann giftur maður við Annette, ættað úr Noregi, og tá búgva tey í Niels Finsensgøtu og hava fingið sonin Hansemann. Jens av Reyni býr eisini hjá teimum.

Ólavur Clementsen hevur kannað hvørji deyð eru í

| | |
|---|---|
| Hans Pauli Joensen, undir Kletti | f. 30.12-1809 í Havn |
| Marin Frederikka Hansen (Hansdatter) | f. 07.01-1825 í Koltri |

Tey giftust í Havnar kirkju 14. oktober 1847

Hans Joensen og systkin hansara:

| | |
|---|---|
| Jógvan Joensen (Joen Joensen) | f. 17.08-1848 |
| Maria Anna Katrina (Marie Anne Cathrine) | f. 09.02-1850 |
| Marin Elisabet (Maren Elisabeth) | f. 01.03-1852 |
| Hans Joensen | f. 25.09-1854 |
| Johannes Joensen | f. 09.10-1855 |
| Nickels Joensen | f. 20.03-1858 |
| Hanna Elisa (Hanne Elisa) | f. 09.02-1861 |
| Poulina Fredrikka (Pouline Frederikke) | f 13.04-1863 |
| Mikal Joensen (Michael) | f. 04.06-1865 |
| Andrea Karolina (Andrea Caroline) | f. 22.07-1867 |

Í fráflytingarlistanum fyri Suðurstreymoy sæst, at Jógvan fór til Keypmannahavnar 14. mai 1866, og hann er komin aftur onkuntíð millum 1870 og 1880, tí í 1880 er hann aftur heima og stendur at vera keypmaður eins og pápin. Helst hevur hann verið uttanlands og fingið sær handilsútbúgving.

Kennir nakar eftirkomarar eftir Jógvan? Hans Joensen stendur at vera "handelsbetjent" í 1880.

Í 1870 eru øll børnini heima uttan Jógvan, sum tá var í Danmark.

Í 1880 eru trý av børnunum ikki heima: Maria Anna Katrina, Nickels og Hanna Elisa.

Í 1890 er Hans Pauli einkjumaður, og trý børn eru heima: Maria Anna Katrina, Hans og Andrea Karolina.

Havn fram til 1892, og ongin av børnunum hjá Hans Paula eru har at finna. Eisini hevur hann hugt at lista í kirkjubókini yvir tey, ið fráflutt eru, og har fann hann heldur einki av hesum børnum. Men fráfaringarlistarnir eru neyvan fullfíggjaðir.

Í 1901 búgva tríggjar av systrunum hjá Hans Joensen í húsunum undir Kletti: Maria Anna Katrina, Maria Elisabet og Andrea Karolina.

Maria Restorff, dóttir Hans Joensen, segði at tvær pápasystrar fluttu til Amerika. Hvørjar vita vit ikki. Eingir upplýsingar eru um møguligar eftirkomarar teirra ella hjá hinum systkjunum hjá Hans Joensen.

Birgit av Lofti, tlf. 312045, og Kirstin Lindberg, tlf. 314202 ella á teldupost: *lofti@post.olivant.fo*

høvdu verið sera fegnar um onkur kundi givið teimum upplýsingar um langabbaog langommu teirra, Maren Frederikku Hansen (Hansdatter) ættað úr Koltri og Hans Paula Joensen, undir Kletti í Havn og systkini hjá abba teirra, Hans Joensen, undir Kletti.



*Hans Pauli Joensen, undir Kletti, úr Havn*
*Marin Frederikka Hansen, í Koltri*



*Hans Joensen, undir Kletti og kona hansara Anette, ættað úr Noregi*



*Børnini hjá Anette og Hans Joensen, f.v.: Maria Restorff, Rudolf Joensen, Anna Dal-Christiansen og Hans Joensen, vanliga nevndur Hansemann*

## Føðingardagur

*Mikudagin 6. februar fylla tvíburarnir Eli Petersen í Havn og Petrina Rasmussen í Gørlev á Sælandi, ættaði úr Kvívík, 80 ár.*



†

## Andlát og jarðarferðir

**Kitty Ziska Kryger**, fødd Niclassen, ættað úr Klaksvík, búsitandi í Keypmannahavn, andaðist leygarmorgunin, 77 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Nathanelskirkjuni, Holmbladsgade 19 á Amager hósdagin kl.12.

**Jørna Sólgerð Grettursdóttir Mikkelsen**, ættað úr Skúvoy, andaðist á Ringkøbing Sjúkrahúsi sunnudagin, 47 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.